## Klinikk hevur skift eigara

1. august yvirtók Sanna Hentze klinikkina, In tone, sum liggur í Jóannes Paturssonargøtu í Havn. Klinikkin bjóðar andlits-, slanki- og vøddastimbrandi viðgerð við ymiskum tólum. Eigarin sigur, at framleiðarin aftanfyri tólini hevði 45 árs serkunnleika og royndir við viðgerðini, sum millum annað geva elektroniska biostimulatión, har signalini líkjast teimum við vanligari venjing, men eru meira virkin. Í sambandi við yvirtøkuna av klinikkini verður serligt tiltak leygardagin 20. oktober frá kl. 10 - 14, har greitt verður frá teimum ymsu viðgerðunum. Meiri kann lesast á intoneclinic.dk.



# Vekja áhuga fyri Norðanlondum

**Leygardagin verður kjakfundur í hølunum hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag, har evnið er Sjálvstýri, samleiki og norðurlendskt samstarv. Tað er Foreningen Nordens Ungdom, sum skipar fyri**

SAMSTARV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Freyja Finnsdóttir og Klaudia Raniszewska skipa fyri panelfundi í morgin*

Í hesum døgum vitja tvey umboð fyri Foreningen Nordens Ungdom í Føroyum. Endamálið er at skapa áhuga millum føroyskan ungdóm fyri samstarvinum millum norðurlendsku tjóðirnar, og tær báðar vóna, at ein føroysk ungdómsdeild verður sett á stovn.

Freyja Finnsdóttir er íslendsk og forkvinna fyri ungdómsfelagnum hjá Foreningen Norden, sum hevur deild í Føroyum. Klaudia Raniszewska er uppruna polsk, men hevur búð í Danmark í 20 ár.

Tær báðar skipa fyri einum panel- og kjakfundi leygardagin í hølunum hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag í Bøgøtu10. Byrjað verður klokkan 13 og hildið fram til klokkan 17.

Umboð fyri politisku flokkarnar verða við umframt eitt umboð fyri tey samkyntu. Ætlanin er, at hesi fáa eitt korter í part til eitt upplegg, og síðani verður kjakast um ymisku uppleggini.

Evnið fyri fundin er »Sjálvstýri, samleiki og norðurlendskt samstarv« við undirheitunum

1) Meining føroyinga um sjálvstýri mótvegis Danmark,

2) Samleiki Føroya í mun til Norðurlond og norðurlendska samstarvið og

3) Ásta Ósk Hloversdóttir fer umframt at leggja fram rættindi teirra samkyntu í upplegginum og verður ein partur av panelinum.

FNU hevur á hvørjum ári eitt slíkt tiltak sum verður hildið upp á skift í ymsu Norðanlondunum. Í ár átti Danmark so tørn, og tey hava valt at leggja tiltakið í Føroyum. Almenna heitið er Café Norden, og vanliga savnast millum 40 og 100 fólk saman til tiltakið.

# Eldur í isolering

**Eldur festi í isoleringina umborð á Magnusi Heinason í gjár, men hesin varð skjótt sløktur**

LØGREGLA
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Um hálvgum fimm-tíðina seinnapartin í gjár varð boðað frá eldi umborð á Magnusi Heinasyni. Sløkkiliðið var skjótt á staðnum og fekk tamarhald á eldinum.

Nógvur roykur stóðst av hesum, men skaðin var lítil og eingin.

Menn frá Skipasmiðjuni høvdu verið umborð fyri at seta nýggj trolspøl í skipið, og hitin frá sveisingini hevur fest í isoleringina í bakborðssíðu. Eitt hendiligt óhapp, verður sagt av politistøðini.

Annars fekk løgreglan um fýratíðina í gjár fráboðan um herverk í bíðirúminum á Gomlurætt. Har hevur onkur lagt eina rørbumbu, sum hevur verið so mikið sterk, at hon sprongdi hol á bakveggin.

Tað var Landsverk, ið hevur eftirlit við bíðirúminum, sum boðaði frá herverkinum. Enn veit løgreglan einki at siga um, hvør kann hava lagt bumbuna í bíðirúmið.

Ein rútur varð eisini brotin í gomlu Køkubúðini, men hetta var ungdómskæti, og løgreglan hevur tikið gerningsmannin, sum fær sekt.



*Eldur kom í isoleringina í bakborðssíðu umborð á Magnusi Heinasyni, men hann varð skjótt sløktur*

# Aftur olja á Havnarvág

**Í gjár bráðaði aftur fram við bryggjuni í Vágsbotni og úti á Skinnaraskeri. Menn frá sløkkiliðnum kannaðu málið, men ilt er at siga, hvar oljan stavar frá**

OLJUDÁLKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Maður frá Tórshavnar Sløkkiliði var á staðnum og kannaði oljudálkingina. Hann roknaði við, at tað fór at verða trupult at finna útav, hvaðani oljan stavaði*

Tað gongur neyvan vika, og í hvussu er ikki mánaði millum, at olja flýtur á Havnarvág.

Aftur í gjár varð boðað frá, at olja bráðaði út fyri Skinaraskerði, og tá vit fóru at kanna málið, var maður frá Tórshavnar Sløkiliði har í somu ørindum.

Hann greiddi okkum frá, at olja var likin úr Suðuroyingi týsdagin, men henni fekst bilbukt við, við at leggja eina oljusperring út, sum seyg oljuna í seg. Maðurin frá sløkkiliðnum dugdi ikki at siga, um oljan í gjár vóru leivdir frá hesum, ella um upprunin skuldi finnast aðrastaðni.

Í hvussu er bráðaði út fyri Skinnaraskerði, bæði vestantil og út móti Tinganesi. Ættin var millum landsynning og sunnan, so oljan kann hava rikið uttanífrá inn á vágna, men hon kann eisini vera komin frá onkrum av skipunum, sum lógu við vestaru kei.

Tað var fjarað eitt sindur, tá vit vóru á staðnum, og tað var týðilig bráðan av olju á skerinum, eins og tað bráðaði fram við keiini í Vágsbotni. Kortini var talan um smáar nøgdir, men oljan var so har – og hon dálkaði.